# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*-Vit góðtaka ikki, at grønlendsk børn sova svong í trappum, so vit eiga at seta heimastýrið undir umsiting*
*(Søren Espersen)*

# Ódn kravt 90 mannalív

**Tropiska ódnin Noel hevur lagt heilar bygdir undir í vatni, og umleið 25.000 fólk hava mist hús og heim**

Eftir áhaldandi regn í trý samdøgur standa heilar bygdir í Dominikanska Lýðveldinum og Haiti undir í vatni, og aðrastaðni royna fólk at stríða seg fram ígjøgnum mold og runu frá skriðulopum.

Myndugleikarnir í Dominikanska Lýðveldinum siga, at har hevur illveðrið kravt minst 41 mannalív, og at minst 33 fólk eru ikki komin afturíaftur. Hildið verður, at umleið 25.000 fólk hava mist hús og heim, og myndugleikarnir hava flutt onnur 20.000 úr húsunum.

Í Haiti hevur illveðrið ikki verið so ringt sum í grannalandinum, men haitisku myndugleikarnir siga, at Noel hevur kravt í hvussu er 20 mannalív har.

Í gjár herjaði Noel partar av Kuba, men har høvdu myndugleikarnir fyrireikað seg væl, og einki er frætt um, at illveðrið kravdi mannalív har. Nú er Noel á veg ímóti Bahamas og Florida. Longu í gjár var brim nógvastaðni har suðuri í Florida, og í South Palm Beach eru fleiri fólk flutt burtur frá strondini.




*Í Dominikanska Lýðveldinum standa stór øki undir í vatni eftir áhaldandi regn*

# 80.000 offur fyri landminum

**Tey seinastu fimm árini eru flóttafólk í Angola komin heimaftur, men nú liggur fíggindin undir fótum teirra**



Borgarakríggið í Angola endaði við vápnahvíld í 2002. Síðani hevur samfelagið roynt at fóta sær, men hóast kríggið er av, verða fólk framvegis særd av teimum túsundtals landminunum, sum liggja eftir frá krígsárunum, og sum verða mettar sum tann størsta hóttanin ímóti øllum samfelagnum.

Á einari ráðstevnu í høvuðsstaðnum Luanda fyrradagin kom fram, at higartil eru umleið 80.000 fólk vorðin offur fyri landminunum. Balbina Silva, sum stendur á odda fyri einari verkætlan, sum hevur til endamáls at beina fyri landminunum í Angola, segði á ráðstevnuni, at landminurnar fara at krevja fleiri offur afturat.

- Landminurnar eru eitt tekin um fátækradømi, tí tær forða fyri menning í samfelagnum, og tær raka tilvildarlig fólk, segði Balbina Silva sambært tíðindastovuni AP. Hon hevur júst skrivað eina frágreiðing um, hvussu samfelagið kann taka sær av teimum, sum eru vorðin offur fyri landminunum.

Reyði Krossur hevur mett, at umleið ein millión landminur liggja enn í jørðini í Angola, og at talan er um 70 ymisk sløg av minum, sum eru gjørdar í 21 ymsum londum. Nógvar av landminunum eru gamlar, men framvegis líka vandamiklar.

*Diana prinsessa gjørdi í síni tíð sítt til at vísa á vandan við teimum nógvu landminunum í Angola*

## STUTT SAGT

### Japan gevst

Japanska stjórnin noyddist í gjár at sleppa ætlan síni at lata landsins herflota halda fram við at hjálpa amerikonsku herskipunum, sum eru tengd at krígnum í Afghanistan. Japan hevur millum annað havt serlig tangaskip, sum hava latið amerikonsku herskipunum í Indiska Havinum olju og annað brennievni. Stjórnin í Tokyo ætlaði at halda fram við stuðlinum til amerikanska herflotan, men meirilutin í tjóðartinginum sigur nei. George W. Bush, forseti, ávaraði fyri nøkrum døgum síðani Japan ímóti at taka síni skip heimaftur, tí tað var ein óheppin boðskapur at senda altjóða samfelagnum, segði hann. Til fánýtis.

### Bhutto fer ikki av landinum

Fyrrverandi pakistanski forsætisráðharrin Benazir Bhutto, sum herfyri kom heim eftir átta ár í útlegd, hevur avlýst eina ætlaða uttanlandsferð, tí leysatíðindi vilja vera við, at stjórnin umhugsar at lýsa landið í undantaksstøðu. Benazir Bhutto hevði ætlað sær til Dubai at vitja mannin og tey trý børnini, men nú hevur hon avlýst ferðina. Hon segði við tíðindafólk í gjár, at hon hevði tikið avgerðina eftir tilmæli frá sínum ráðgevum og stuðlum.

### Rúsevni í tonsavís

Myndugleikarnir í Meksiko gjørdu eitt rimmar kvetti, tá teir í gjár løgdu hald á heili rllivu tons av kokaini í havnarbýnum Manzamillo. Í sambandi við vanligt eftirlit umborð á einum farmaskipi komu tollararnir fram á rúsevnið í einari bingju, sum skipið hevði fermt í Buenaventura í Kolombia. Hetta er ein tann størsti rúsevnafongurin hjá meksikanska tollvaldinum nakrantíð og eitt úrslit av, at myndugleikarnir hava hert tiltøkini ímóti rúsevnasmugling.